Sosialurin
# VARPIÐ
FRÍGGJADAGUR 26. mai 2006



**Mafiumenn**
James Belushi hevur leiklutin sum mafiamaðurin, sum hevur tikið 12 milliónir dollarar úr kassanum. Ein stuldur, sum ikki bara sendir løgguna eftir honum, men eisini sjálvan Godfather.

**Hósdagin kl. 20.00**



**Mínir 100.000 elskarar**
Sexnarkomani er ofta tengt at lágari sjálvsvirðing. Tey, sum føla seg noydd at finna nýggjar partnarar og nýggjar stimulatiónir, gera hetta, tí hetta er einasti hátturin, tey duga at finna heitar kenslur uppá. Líkamikið, hvussu meiningsleysur atburður teirra oftani tykist.

**Mánadagin kl. 20.25**

**Frank Sinatra og dupultlív hansara**
Gjøgnum alt sítt vaksna lív fylgdist Frank Sinarta við mafiuni. Tað var mafian, sum í 40 árunum fekk hann fram sum sangara, og skjótt gjørdist hann heimsstjørna. Hinvegin siga tey, at Sinatra smuglaði rúgvur av mafiapengum til Kuba til at vaska. Tá Sinatra misti stevið í fimtiárunum, var tað ávirkanin hjá mafiuni í Hollywood, sum fekk honum leiklutin í filminum "Hiðani til ævinleikan". Sinatra fekk ein Oskar og var aftur stjørna. Men tá hann seinast í fimtiárunum royndi at koma sær uppí hjá Kennedy ættini, var tað sambandið við mafiuna, sum gjørdi at, hann ongatíð kom í nánd av politiskum arbeiði.

**Mánadagin kl. 20.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**